# Kim Wilde og Bryan Rice brúktu bíðitíðina

**Klaus Meine vísti Kim Wilde myndir av Føroyum á fartelefonini, og segði henni, at Føroyar eru eitt fantastiskt stað og at teir høvdu eina av sínum bestu pallupplivingum**

Summarfestivalurin 07
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo



*Umboð fyri Sosialin hittir Kim Wilde og Bryan Rice á Hotel Føroyum sunnukvøldið, meðan tey bíðað eftir at sleppa úr Føroyum.*

*Mynd: E.S*

Kim Wilde og Bryan Rice sótu sunnukvøldið á Hotel Føroyum og bíðu eftir at sleppa avstað við flogfari. Sosialurin fekk orð á tey bæði, meðan tey bíðaðu.

Í samrøðu søgdu tey bæði, at tey hava hugnað sær í Føroyum.

Kim Wilde, Bryan og manning hansara hugnaðu sær á Café Natúr leygarkvøldið við sangi og spæli, og Kim Wilde fór eisini eina løtu á pall í Rex.

Spurd, um hon er kedd av, at hon ikki slapp á pall, sigur hon skemtandi, men sorgblíð, at hon jú var á palli leygarkvøldið, men at tað jú var á ymsum skeinkistøðum í Havn. Men hon er sjálvsagt kedd av, at tað ikki eydnaðist at spæla á Summarfestivalinum, men hon vónar, at hon sleppur aftur eina aðruferð.

Kim Wilde hitti Klaus Meine úr Scorpions ávegis til Summarfestivalin, og hann greiddi henni frá, at Føroyar eru eitt fantastiskt stað og at teir høvdu eina av sínum bestu pallupplivingum á Summarfestivalinum.

Og Kim Wilde er samd við Klaus Meine, og hon metir, at vakurleikin her minnir ikki sørt um økið, ið hon sjálv kemur frá í Onglandi.

Hon hevur havt tað gott á Føroyaferðini, men vónaði at sleppa avstað úr Føroyum, tí aðrar uppgávur bíða.

Bryan

Bryan Rice fór á pall á Summarfestivalinum, men mátti gevast. Tourmeistari hansara gjørdi bart, og tók Bryan av palli, tá Bryan hevði spælt 5 løg, tí festivaltjaldið var við at fara í nógva vindinum.

Bryan er keddur av, at tað ikki eydnaðist at spæla øll løgini og at hann ikki eingang fekk sagt lurtarafjøldini takk og farvæl.

- Vit spældu eina konsert og nutu hvørja løtu, tí tað gekk væl hjá okkum. Og mær dámar eisini so sera væl at vitja í Føroyum, so eg vóni, at eg sleppi at vitja aftur, sigur Bryan Rice.

Bryan skuldi ætlandi til Svøríkis klokkan 7 mánamorgunin, men tað var sera ivasamt sunnukvøldið, tí Kim og Bryan væntaðu ikki at sleppa avstað fyrr enn klokkan 3 á nátt, tí flogferðslan hevur verið so nógv seinkað.

# Húskallar fara sjálvir á pall

**Húskallar sópa allan iva burtur um, at teir nú als ikki verða at hoyra í summar. Eftir at veðrið setti forðingar fyri teirra framførslu á Summarfestivalinum, hava teir avgjørt at skipa fyri konsert sjálvir. Leygarkvøldið høvdu teir annars lítla konsert í stovuni hjá Jákup Alberg fyri 30 fólkum**

SUMMARFESTIVAL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Flest øll raðfestu framførsluna hjá Húskøllum frammaliga í skránni fyri Summarfestivalin. men ódnarveðrið forðaði fyri, at Húskallar fingu sína endurreisn á Summarfestivalinum.

Húskallarnir, ið settu ein útgávuvarða eftir seg fyri mongum árum síðani, høvdu aftur funnið saman og vant dúgliga, og vóru til dystin fús. Og mong gleddu seg til hesa framførsluna við Kaj Johannesen, Jákupi Alberg Eliasen, Jón McBirnie og hinum í bólkinum.

Teir høvdu royndarframførslu í stovuni hjá Jákupi Alberg í Leirvík leygardagin, men fingu so at vita, at teirra framførsla var útsett til klokkan 3 á nátt. Og seinni, at ongin framførsla bleiv, tí alt var avlýst á Summarfestivalinum vegna vánaligt veður.

- At Húskallar fara aftur í gongd merkir í veruleikanum, at eitt stórt maskinarí skal í gongd, og vit høva havt eini 10- 12 fólk í gongd. Allir tónleikarar stóðu klárir, og vit fóru so eisini til Klaksvíkar at hitta fyrireikararnar og heilsa uppá, so øll viðurskifti okkata millum í lagi, siga Húskallar, og leggja afturat, at møguleiki er fyri, at teir verða fluttir til festivalin komandi ár.

## Stovukonsert

- Vit gjørdu so tað, at vit høvdu eina konsert í stovuni hjá Jákupi Alberg fyri eini 30 fólkum klokkan 3 á nátt. Men vit arbeiða við at gera eina konsert´seinast í august í Havn, og møgiliga verður hon eisini tikin upp, siga Húskallar, sum tó viðganga, at stóra maskinan er ring at stýra, tí t.d. eru blásararnir, ið allir búgva niðri, farnir av landinum aftur tá.

Men staðfestast kann, at spennandi framførslan á Summarfestivalinum, ið bleiv av ongum, ikki merkir, at Húskallar ikki verða at hoyra í ár. Teir arbeiða við at skipa fyri konsert sjálvir og harvið sópa Húskallar allan iva burtur um, at teir ikki verða at hoyra í summar.



*Húskallar sópa allan iva burtur um, at teir ikki verða at hoyra í summar, tí teir skipa sjálvir fyri konsert*

*Mynd: Sunva Lassen*